Búskapur og vinna:

## Norðmenn svika við russiskum toski

Kanningar hjá norska tollverkinum hava avdúkað, at nógvir norskir fiskaútflytarar selja russiskan tosk sum norskan. Higartil hevur tollverkið kannað 1700 skjøl um upprunaland, og 340 teirra vístu seg at vera falsað. Sambært einum talsmanni hjá tollverkinum snýr tað seg um 6000 tons av russiskum toski, men sum sambært skjølunum var norskur toskur. ES leggur 12 prosent í tolli oman á russiskan tosk, meðan norskur toskur ikki rindar toll í ES. Við at skráseta russiska toskin sum norskan slepst undan tolli, og tað ger, at norsku útflytararnir kunnu slaka eitt sindur í prísinum, tá fiskurin verður seldur keyparum í ES-londunum.

Norska tollverkið hevur higartil kannað skjøl hjá 18 útflutningsfyritøkum. Nakrar fyritøkur hava kært viðgerðina, og tí er væl hugsandi, at svikið við russiska toskinum er uppaftur størri enn tað, sum higartil er avdúkað, sigur tollverkið.

## Mist alt

Ein søga úr Svøríki er eitt gott dømi um, at ein eigur at hugsa seg væl um, áðrenn ein setit pengar í vinnulívið. Fyri nøkrum árum síðani lænti greivin Archibal Hamilton 110 milliónir krónur, sum hann keypti partabrøv í stórfyritøkuni Ericsson fyri. Men nú er virðið á partabrøvunum fallið so nógv, at vandi er fyri, at greivin kann missa sín garð, sum ætt hansara hevur átt í meiri enn 200 ár. Svensk bløð skriva, at hevði greivin selt partabrøvini fyri tveimum árum síðani, hevði hann fingið eina milliard krónur fyri tey...

## Meiri til bøndurnar

Norska stjórnin hevur gjørt av at hækka stuðulin til bøndurnar. Upprunaliga ætlaði stjórnin at lata bøndrunum 340 milliónir krónur afturat, men eftir nýggju samtyktini fáa bøndurnir heilar 750 milliónir krónur í eyka stuðuli. Tað ber í sær, at hvørt ársverk fær 10.000 krónur afturat verandi stuðuli.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Halda seg hava funnið líkið av Daniel Pearl



*Hesa myndina av Daniel Pearl almannakunngjørdu burturflytararnir stutt eftir, at hann var vorðin burturfluttur*

*Mynd: Reuters*

**Myndugleikarnir í Pakistan halda seg nú hava funnið líkið av horvna amerikanska tíðindamanninum Daniel Pearl**

PAKISTAN

*Árni Joensen*

Ein talsmaður hjá pakistansku løgregluni segði í gjár, at løgreglan heldur seg nú hava funnið líkið av amerikanska tíðindamanninum Daniel Pearl, sum varð burturfluttur í býnum Karachi í januar.

- Vit hava funnið eitt lík. Læknar eru í ferð við at kanna tað, men vit halda okkum kunna siga við vissu, at tað er Daniel Pearl, segði talsmaðurin. Hann legði afturat, at tann deyði er vorðin hálshøgdur.

Sambært talsmanninum fekk løgreglan frænir av, hvar líkið var, tá løgreglan avhoyrdi ein víðgongdan mann í sambandi við átrúnaðarligan yvirgang.

Tað vóru víðgongdir muslimar, sum burturfluttu Daniel Pearl í januar. Í februar fingu amerikansku myndugleikarnir prógv fyri, at hann var deyður, tá burturflytararnir sendu myndugleikunum eitt sjónband, sum vísti, at tíðindamaðurin var hálshøgdur.

Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at pakistanska løgreglan sigur seg hava funnið líkið av Daniel Pearl. Tíðliga í februar fann løgreglan eitt lík uttan fyri Karachi. Eisini tá helt løgreglan, at talan var um Daniel Pearl, men kanningar vístu, at so var ikki.

# Eingi prógv ímóti Arafat

**Hvørki Yasser Arafat ella aðrir palestinskir leiðarar hava havt beinleiðis samband við yvirgangsatsóknirnar at Ísrael, standur í einari amerikanski frágreiðing**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

Frágreiðingin, sum amerikanska uttanríkisráðið hevur gjørt fyri kongressina í Washington, sigur, at tað finnast eingi prógv fyri, at leiðandi menn í palestinsku sjálvsstýrismyndugleikunum hava givið boð um atsóknir at ísraelskum málum. Hinvegin finst frágreiðingin atYasser Arafat og hinum leiðarunum, tí teir gjørdu ov lítið fyri at steðga atsóknunum at Ísrael.

Í frágreiðingini stendur, at alt bendir á, at leiðandi menn í palestinsku sjálvstýrisrørsluni PLO og innan palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnar hava verið vitandi um, at limir í felagsskapinum hjá Arafat vóru uppi í atsóknum at Ísrael, uttan at teir gjørdu nakað fyri at forða teimum. Sagt verður eisini, at menn í lívverjuni hjá Arafat vóru uppi í fleiri atsóknum.

Amerikanska uttanríkisráðið finst eisini at palestinsku myndugleikunum, tí teir gera ov lítið burtur úr at revsa menn, sum taka lut í atsóknum at Ísrael. Sagt verður, at nógvir menn verða latnir leysir aftan á avhoyringar, hóast teir uttan iva eru sekir.

Frágreiðingin hjá uttanríkisráðnum í Washington umfatar tilburðir í Miðeystri frá 16. juni til 15. desember í fjør, men hon umfatar ikki tað nógv umrødda vápnasmuglaraskipið "Karina A", sum ísraelsku myndugleikarnir løgdu hald á. Ísrael vil vera við, at Yasser Arafat og aðrir í palestinsku sjálvstýrismyndugleikunum vistu um skipið og vápnini, men tað hava palestinar avsannað.

Úr Norðurlondum:

## Læknar í stríð

Donsku læknarnir eru alt annað enn fegnir um eitt uppskot hjá stjórnini, sum ber í sær, at fólk frítt kunnu velja tann lækna, tey vilja hava, og sama hvussu langt burturi læknin býr.

Felagskapurin hjá læknunum sigur, at uppskotið hjá stjórnini er brot á samráðingarrættin hjá læknunum, og teir vilja eisini vera við, at ætlanin fer at bera í sær fleiri trupulleikar, sum stjórnin ikki hevur tikið við.

Formaðurin í læknafelagnum, Jørgen Larsen, sigur, at limir hansara eru vanlig siðilig fólk, men at uppskotið hjá stjórnini hevur fingið øði í fleiri teirra. Læknarnir ætla sær tí at stríðast ímóti ætlanini, sigur hann.

## Verkfall liðugt

Tey, sum arbeiða á gistingarhúsunum í Noregi, fara nú aftur til arbeiðis eftir at hava verið í verkfalli í meiri enn ein mánað. Tann nýggi sáttmálin gevur starvsfólkunum hægri tímaløn og størri samsýning fyri vikuskiftis- og halgidagsarbeiði.

Umleið 4.000 starvsfólk á norsku gistingarhúsunum hava verið við hús seinastu fimm vikurnar. Talsmenn hjá vinnuni hava sagt, at verkfallið hevur kostað gistingarhúsunum nógvar pengar. M. a. eru fleiri ráðstevnur avlýstar í seinastuni.

## Vilja ikki akta

Leiðslan í valfelagnum hjá Vinstraflokkinum í danska býnum Farum sýtir fyri at koyra tann umstrídda fyrrverandi borgarstjóran Peter Brixtofte úr felagnum. Fyrr í vikuni samtykti fólkatingsbólkurin hjá Vinstra at koyra Peter Brixtofte úr bólkinum, og Anders Fogh Rasmussen, floksformaður segði, at valfelagið í Farum átti at gera tað sama. Men tað vil leiðslan í felagnum ikki. Hon ætlar sær at bíða, til málið um atburðin hjá fyrrverandi borgarstjóranum er kannað, so greiði fæst á, um hann er sekur ella ikki.





# Tinghellan



Føroyar í 2006:

# Lyklaorðini eru samstarv og tilrættalegging



*Jan Müller*

**Í farna mánað skipaði felagið "Oljutingið" fyri fundi í Sjónleikarahúsinum í Havn. Evnið varð avleiðingar av eini komandi oljuvinnu. Millum pallborðsluttakararnar var eisini Jan Müller, blaðstjóri. Vit prenta innlegg hansara í Tinghelluni í dag**

Evnið er, hvussu Føroyar koma at síggja út í 2006 við atliti til eina oljutilgongd.

Vit tosa sostatt um fýra ár sum so aftur er eitt heilt valskeið. Hvat fer at henda í hesum valskeiði vita vit ikki, hvørki hvussu verður við sjálvststýri, fullveldi ella sambandi.Vit vita líka lítið, hvussu verður við oljutilgongdini. So til ber at siga her í kvøld, at vit standa rættiliga á berum at meta um, hvussu hetta samfelagið sær út bæði politiskt og vinnuliga um fýra ár.

Men okkurt vita vit kortini. Vit vita, at tá vit skriva 2006, so hava vit fingið ein undirsjóvartunnil fyri 200-300 milliónir, og tann næsti fyri 400 til 500 mill. er á gáttuni. Vit vita, at størsta íløgan í Føroyum nakrantíð, nýggja Norrøna fyri 600 til 700 mill. kr. er vorðin veruleiki. Vit vita eisini, at størsti almenni sáttmálin nakrantíð, bygging av nýggjum Smyrli, fyri 300 milliónir, er vorðin veruleiki. Hetta nevni eg bert fyri at vísa á nakrar av teimum risastóru íløgunum, sum samfelagið ger komandi fýra árini.

Vit sita her í kvøld fyri at tosa um avleiðingar av eini oljuvinnu, sum ógvuliga stór óvissa er um. Tað er sum um at mong av okkum líkasum vilja gera hana til stóra djórið í opinberingini, til gullkálvin dansað fer at verða um.

Tað verður sagt, at tað verður olja og inntøkurnar frá henni, sum fara at hava kollveltandi avleiðingar fyri samfelagið og okkum øll, uppá gott og ilt.

Men hvussu ber tað til, at vit vilja tosa so nógv um eina avbjóðing, sum vit ikki enn vita kemur og sum kanska liggur langt frammi í tíðini, tá vit um somu tíð ikki tosa um tað vit kunnu føla uppá, síggja og merkja her og nú, og sum eingin uttanífrá hevur tvingað inn á okkum men sum eru okkara egnu ynski og gerðir! Eg hugsi um umrøddu risastóru íløgur í ferjur, tunlar og annað komandi fýra árini uppá millum 1,5 og 2 milliardir. Koma ikki eisini hesar íløgurnar at hava kollveltandi avleiðingar uppá okkara samfelag og seta tær ikki eisini stór krøv til eitt alment kjak um hetta. Well, tær hoyra kanska ikki heima í júst oljutinginum.

Taka vit so tilfeingi sum so, verður nógv tosað um og stúrt fyri, tá talan er um oljutilfeingið, nevniliga hvussu tað kann ávirka umhvørvið, trygd og mentan osfr. Men hvussu ber tað til, at vit ikki eisini kjakast og seta somu spurningar, tá tað um fiskatilfeingi okkara og annað tilfeingi umrædur!

Eg haldi tað er av stórum týdningi, at vit fáa eitt kjak um oljutilgongdina og hvussu hon uppá gott og ilt kann ávirka hetta fólkið og samfelagið. At vit tosa um tann nógva peningin, sum kann streyma inn í samfelagið. Men samtíðis haldi eg tað vera eitt sindur løgið og øvugt, at tá vit gera risaíløgur annars, sum hava stórar broytingar við sær í samfelagnum, eitt nú íløgur í tunlar, skip, vegir og havnir, at vit tá ikki at tosa um, hvussu hesar uppá gott og ilt fara at ávirka samfelagið. Her hugsi eg eisini um tær fíggjarligu bindingar, sum vit gera til komandi ættarlið, um tíðirnar versna osfr.

### Menna egnan førleika

Og fyri at taka ein paralell ber eisini til at samanbera hetta við orðaskiftið um sjálvstýri og fullveldi og so hetta við eini nýggjari oljuvinnu. Skulu vit vera meira sjálvbjargin og so við og við taka ábyrgdina av øllum samfelagnum sjálvi, hvat eg haldi er skilagott, so verður oftani spurt, hvussu vit megna at átaka okkum allar tær ymsu uppgávurnar til tess at tryggja eina skilagóða tilgongd, og hvussu skjót henda tilgongd skal vera.

Í oljuprátinum stingur hetta sama seg upp. Hvussu stýra vit sjálvi hesum útviklinginum og hvussu megna vit at førleikamenna okkara egnu fólk til at tryggja eina skilagóða gongd! Hvussu tryggja vit okkum best, soleiðis at vit sjálvi eru før fyri at seta tey røttu krøvini til oljufeløgini, at fáa tey røttu ynskini fram, at stýra gongdini, at hava neyðuga eftirlitið osfr!

Og svarið til hetta er at brúka neyuðugu tíðina og orkuna til at førleikamenna okkara egnu fólk, stovnar og samfelag sum heild. Ikki bara tey fólkini, sum skulu arbeiða í hesi vinnu, men so sanniliga eisini nógvar aðrar tættir í samfelagnum og her ikki minst útbúgvingarverkið og mentanarlívið.

Vit skulu stýra, fyrskipa og ráða í egnum landi. Vit skulu stýra gongdini. Bæði politiskt og vinnuliga. Tað eru vit sjálvi best før fyri. Men til tess mugu vit fáa okkum tey røttu amboðini. Tey røttu fólkini og tær røttu umstøðurnar.

Skulu vit seta oljufeløgunum krøv og stýra gongdini, mugu vit eisini syrgja fyri, at tey hava røttu og bestu umstøðurnar at virka út frá. Tá verður eisini hugsað um íbúðir, barnagarðspláss osfr. Vilja vit troyta hetta nýggja tilfeingið, ið møguliga er í undirgrundini, so mugu vit førleikamenna ikki bara vinnuna men alt samfelagið. Tað haldi eg vit eiga at brúka komandi fýra árini fram til 2006 til.

Í dag vita vit ikki um lønandi felt eru. Vit vita tað kanska heldur ikki í 2006. Spurningurin er at hava tol eins og í øðrum samfelagsligum spurningum. Tað ræður um ikki at leypa framav men geva sær neyðugu tíðina. So førleikamenningin er nettup ein spurningur um tilrættalegging og at geva sær neyðugu tíðina til at kunna troyta tilfeingið skilabest og til at tryggja sær, at avleiðingarnar av at troyta tilfeingið eru mest av positivum slag.

### Samstarv lyklaorðið

Og í øllum hesum er lykaorðið samstarv og aftur samstarv. Tað er eisini grundarlagið undir førleikamenningini. Vit byggja einki land uttan eitt gott samstarv og virðing fyri hvørjum øðrum. Vit fáa heldur onga skilagóða oljutilgongd uttan samstarv og virðing fyri hvørjum øðrum.

Onkustaðni skulu vit byrja, og eg haldi, at byrjanin hevur verið skilagóð, líka frá yvirtøkuni av oljuni í undirgrundini, til avtaluna við bretar um markið, forkanningarnar og nú til fyrstu boringarnar. Vit fingu eitt oljumálastýri til burturav at taka sær av hesi nýggju avbjóðing. Eg veit, at ikki øll halda, at tað var neyðugt, tí hetta átti at verið ein uppgáva hjá vinnumálastýrinum. Eg hoyri til teirra, sum halda, at hetta var skilagott. Men skriva vit 2006 veit heldur eingin her í kvøld, hvør lagnan hjá hesum stýri verður. Lat okkum siga at Agip borar ikki í ár, Statoil og BP bíða til 2004 ella 5, og Hess ikki er heppið í síni boring hinumegin markið í ár. Tá kunnu vit kanska spyrja, hvør lagnan verður hjá oljumálastýrinum. Kann tað hugsast at ein komandi samgonga finnur uppá at niðurleggja tað? Stýrið ella landsstýrismaðurin fyri olju var lutvíst ein politisk neyðsemjuloysn fyri at fáa politisku kabalina at ganga upp. Kann tað nú henda, at fyri at fáa enn eina politiska kabalu at ganga upp, at man so avtekur sama stýrið, eisini við tí grundgeving, at her hendir ov lítið? Eg veit tað ikki. Eingin her veit tað. Men verður nógv olja funnin, so verður so sanniliga brúk fyri hesum stýri og landsstýrismanninum eisini. Tá fara vit eisini at sanna, at tað var skilagott av okkum at gera tingini væl og grundiga frá byrjan. Tí haldi eg, at Oljumálastýrið eigur halda fram við sínum arbeiði, tó at tað altíð kunnu vera ymsar meiningar og metingar um ymisk viðurskifti, eitt nú um, hvussu pengarnir til førleikamenning ol. skulu brúkast. Her vita vit, at t.d. Mentamálastýrið fegið sá, at pengar frá førleikapuljuni frá oljufeløgunum eisini fóru til mentanina.

Tá tað so verður tosað um samstarv, so er tað eisini umráðandi, at stýrini sínamillum samstarva, nakað, sum vit kanska ikki hava ov nógvar góðar royndir av. Og her haldi eg tað er sera umráðandi, at vit fáa ein betri ella størri dialog millum eitt nú Oljumálastýrið og Menta- og útbúgvingarmálastýrið sum so aftur syrgja fyri, at teirra avgerðir passa inn í samlaðu samfelagsmyndina tvs. at eisini onnur stýri vita av teirra gerðum og avleiðingunum av teimum fyri aðrir tættir av samfelagnum.

So kanska er lyklaorðið í hesum spurningum nettupp eitt tættari og betri samstarv millum øll tey ymsu stýrini fyri ikki at tosa um landsstýrismenninar. Ja kanska tað kundi verið eitt hugskot at havt ein felagsnevnara, eina nevnd við einum umboði úr hvørjum stýri, sum nettup fekk til uppgávu at samskipa og reisa teir røttu spurningarnar til røttu tíðina, tá tað snýr seg um eina komandi stóra oljuvinnu. Hvussu hon verður best frágingin og hvussu negativu avleiðingarnar av henni verður minst møguligir. Tað skal vera mítt ynski.

Hóast oljutjakið hevur alstóran týdning, lat okkum tó ikki gloyma manglandi orðaskiftið um avleiðingarnar av milliarda íløgunum, sum samfelagið ger í hesum tíðum. Her kundi so ein av spurningunum verið, hvørji krøv undirsjóvartunlarnir, sum fara at knýta stórar partar av landinum nærri saman, fara at seta til okkara ferðslumentan.